# Hilmar Kass 80 ár



Leygardagin 2. desember fylti Hilmar Kass, fyrrverandi sjómansskúlalærari og løgtingsmaður, 80 ár.

Hilmar, ið er strandingur, var í mong ár ímyndin av Sjálvsstýrisflokkinum.

Hann fór 16 ára gamal til skips við Austerlitz, sum pápin førdi. Hann sigldi til 1948, tá hann fór at ganga á stýrimansskúla og tók prógv á vári í 1950. Síðan fór hann til Keypmannahavnar, har hann tók skipsføraraprógv í 1950 og prógv sum fjarritari í 1951.

Eftir at hava siglt í fleiri ár legðist hann upp á land í 1957. Í 1962 tók hann læraraprógv á Føroya Læraraskúla og var lærari á Millum- og realskúlanum í Havn skúlaárið 1962-63.

Frá 1963 til 1969 var hann lærari á Føroya Studentaskúla í Hoydølum, umframt at hann var próvdómari á Føroya Sjómansskúla frá 1966-69.

Í 1969 fekk hann fekk starv á Føroya Sjómansskúla sum lærari, har hann var varaskúlastjóri í 20 ár, frá 1973 til 1993. Hann var settur skúlastjóri í 1994, tá hann legði frá sær á skúlanum sum 67 ára gamal.

Í 1966 var Hilmar valdur inn á ting fyri Sjálvstýrisflokkin í Suðurstreymoyar vældømi. Hann var formaður flokksins og formaður í løgtingsins marknaðarnevnd frá 1970-74 og frá 1981-88. Hann sat á tingi til 1988, tá hann valdi ikki at stilla upp aftur.

Umframt at Hilmar var sjórættarlimur frá 1963-78, hevur hann sitið í nógvum ymiskum nevndum sum t.d. nevndini í Hvíldarheiminum Naina, Føroya Barnaheimi og Tryggingarsambandinum Føroya, har hann eisini var formaður eitt langt tíðarskeið.

Hilmar hevur altíð havt stóran áhuga fyri jarðarbrúki og seyðahaldi. Hann eigur jørð bæði í Havn og á Strondum, og honum dámar framvegis væl at fáast við jarðarbrúk.

Foreldrini hjá Hilmari vóru Sanna, f. Lamhauge úr Lamba, og Bartal Johansen av Strondum.

Hilmar giftist við Lydiu, f. Danielsen, úr Porkeri. Tey eiga tvey børn: Bartal, sum býr í Danmark, og Anna sum býr í Hoyvík. Barnabørnini eru fýra í tali.




## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, ið mintust meg á 80 ára degi mínum.

Takk fyri uppringing, telegrammir og gávur, og takk øll ið stukku inn á gólvið.

**Erling Kjærbo**
*Sumba*

Gamlar myndir:

# Neytakonur í Kvívík



Hendan myndin et tikin í umleið 1950 av neytakonum í Kvívík saman við nøkrum gentum.

Aftara rað f.v.: Sunneva Petersen og mamman Augusta Petersen og Maria Petersen.

Gentan í miðjuni er Jona Thomasen.

Fremra rað f.v.: Kára Petersen, eisini dóttir Augustu, og systrarnar Sigrun, Marjun og Elin Grønholm, døtur hjá Hjørdis, f. Thomasen, og Verner Grønholm. Tær búðu í Danmark, og vóru komnar til Føroyar í summarferiu. Mamman, Hjørdis, er dóttir Tummas Thomasen (Kvívíks Tummas).

*Myndaeigari: Eli Petersen*

# Føroyskur dansur



Her er ein onnur mynd hjá Eli Petersen. Føroyskur dansur í stovuni f.v.: Ludvík Christiansen á Stykkinum og konan, Elisabeth, Hanna Nielsen í Kvívík. Myndin er helst tikin í 60-unum í Kvívík.